# TB fann stevið aftur

**Tryggur heimasigur á Sevmýru og tap hjá Royn á Sandi førdu við sær, at TB aftur er einsamalt oddalið í aðru deild**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Aftur hetta vikuskiftið stóð fult umfar á skránni í aðru deild.

Og her eydnaðist TB at endurvinna einsamalla oddasessin, sum teir annars mistu einkarættin til, tá teir fyri viku síðani taptu fyri FS Vágum.

Hesaferð var tað LÍF, sum vitjaði á Sevmýru, og hóast leirvíkingarnir royndu at fylgja við, so var tað at enda eingin ivi um, at TB var betra liðið í dystinum.

Hampuliga tíðliga í dystinum legði Hallur Christiansen vertirnar á odda, og teir hóttu leingi við at økja um munin, áðrenn Niels Pauli Justinussen brádliga javnaði fyri gestirnar.

Hetta gav TB ein lítlan hvøkk, og støðan helt sær eisini til hálvleiks. Eftir 20 minuttum eydnaðist tó Einari Petersen at leggja TB framum aftur, og tá so LÍF móti endanum royndi at flyta fólk niðan, skrædnaði í verjupartinum. Hetta høvið nýttu teir báðir nýtilkomnu ghanesararnir hjá TB til at gera hvør sítt mál, og so er spurningurin, hvørt hesi bara vóru ein forsmakkur av tí, sum tvørafólk nú hava í væntu.



*Tvøramenn hava fingið tilgongd av tveimum ghanesiskum fótbóltsleikarum, og teir gjørdu báðir um seg í sigrinum á LÍF*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### KÍ av botninum

Á Sandi skuldi Royn royna at halda fast í oddaliðnum, men hetta eydnaðist teimum ikki. Sandoyingarnir syrgdu nevnliga við greiðum 4-1 sigri fyri, at teir so sanniliga eisini skulu roknast við í oddastríðnum.

At Royn so eisini misti málverjan, tá hesin varð rikin av vølli í seinna hálvleiki – tá sandoyingar fingu brotsspark til 3-1 – mundi ikki gera lagið á heimferðini betri, og so er spurningurin, hvørt hetta er ein missur, sum fer at merkjast, tá hvalbingarnir næstu ferð eiga heimavøll móti B36.

AB og FS Vágar teljast eisini millum liðini, sum stríðast fyri at vinna sær uppflyting til bestu deildina, men hvørki teirra megnaði tó at fáa fult um vikuskiftið.

AB stóð til at tapa dystin í Gundadali, har B36 var omaná fyri steðgin. Men tað var so ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at ungi Levi Hansen eisini gav vertunum leiðslumálið. AB royndi eftir hetta at trýsta, og tað eydnaðist teimum eisini hampuliga skjótt at javna, tá verjuleikarin, Bernhard Petersen hevði sníkt seg framvið til eitt hornaspark.

FS Vágar leiktu sunnudagin í Sumba, og eisini hjá teimum gjørdist javnleikur endaliga úrslitið. Tað vóru fyri tað mesta vertirnir, sum vóru omaná, men tað var ikki fyrr enn á tímanum, at Súni í Hørg kundi leggja teir á odda. Og heilt fram til seinastu minuttirnar var eisini líkt til, at hetta skuldi gerast endaliga støðan. Men fimm minuttir fyri leiklok eydnaðist tó Per Joensen at senda bóltin í Sumba-málið, soleiðis at vágamenn fingu eitt stig við sær norður umaftur.

Í Klaksvík var stevnudystur, tá VB var á vitjan í einum dysti, har bæði liðini høvdu stóran tørv á stigunum. Og tað eydnaðist eisini heimaliðnum, sum annars ikki hevur vunnið í ár, at ogna sær trý stig. Einasta málið fingu teir í fyrra hálvleiki, og við sigrinum lyftu teir so upp um LÍF, soleiðis at teir aftur nú eru røttu megin vandamiklu strikuna.



*Leingi var Sumba omaná, men tað eydnaðist at enda FS Vágum at fáa javnleikin og harvið annað stigið, tá liðini dystaðust á Krossinum sunnudagin*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### 1. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 6 | 4 - 2 - 0 | 14 | 5 | 9 | 14 |
| 2 | HB | 6 | 4 - 1 - 1 | 17 | 7 | 10 | 13 |
| 3 | VB | 6 | 3 - 2 - 1 | 10 | 5 | 5 | 11 |
| 4 | NSÍ | 6 | 2 - 3 - 1 | 11 | 10 | 1 | 9 |
| 5 | EB/Streymur | 6 | 2 - 2 - 2 | 12 | 9 | 3 | 8 |
| 6 | B36 | 6 | 2 - 2 - 2 | 12 | 10 | 2 | 8 |
| 7 | GÍ | 6 | 2 - 2 - 2 | 8 | 10 | -2 | 8 |
| 8 | KÍ | 6 | 1 - 4 - 1 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 9 | ÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 10 | 21 | -11 | 3 |
| 10 | B68 | 6 | 0 - 0 - 6 | 4 | 20 | -16 | 0 |

### 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 6 | 5 - 0 - 1 | 20 | 9 | 11 | 15 |
| 2 | Royn | 6 | 4 - 0 - 2 | 17 | 12 | 5 | 12 |
| 3 | B71 | 6 | 4 - 0 - 2 | 16 | 16 | 0 | 12 |
| 4 | AB | 6 | 3 - 2 - 1 | 11 | 8 | 3 | 11 |
| 5 | FSV | 6 | 3 - 1 - 2 | 19 | 10 | 9 | 10 |
| 6 | Sumba | 6 | 3 - 1 - 2 | 11 | 10 | 1 | 10 |
| 7 | B36 | 6 | 2 - 1 - 3 | 9 | 14 | -5 | 7 |
| 8 | KÍ | 6 | 1 - 1 - 4 | 9 | 14 | -5 | 4 |
| 9 | LÍF | 6 | 1 - 1 - 4 | 8 | 16 | -8 | 4 |
| 10 | VB | 6 | 0 - 1 - 5 | 5 | 16 | -11 | 1 |

### Máltindurin

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Heine Fernandez | HB | 5 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 5 |
| Bogi Gregersen | Skála | 5 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 4 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| John Petersen | B36 | 3 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 3 |
| Rúni Elttør | ÍF | 3 |
| Atli Danielsen | KÍ | 3 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 3 |
| Áki Mørk | B36 | 2 |
| Bárður Mortansson | B36 | 2 |
| Egil á Bø | B36 | 2 |
| Øssur Hansen | B68 | 2 |
| Hallur Jacobsen | EB/S | 2 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 2 |
| Erling Fles | KÍ | 2 |
| Stig Aksnes | KÍ | 2 |
| Gert Langgaard | NSÍ | 2 |
| Jónstein Petersen | NSÍ | 2 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 2 |
| Nenad Stankovic | Skála | 2 |
| Milan Kulic | VB | 2 |
| Mindaugas | VB | 2 |
| Palli Augustinussen | VB | 2 |



## Útibarnagarðurin Fjallafípan í Klaksvík

Søkt verður eftir
**2 námsfrøðingum at byrja 1. august 2004.**

- 1 námsfrøðingi at byrja 1. august 30 tímar viku
- 1 námsfrøðingi at byrja 1. august 40 tímar viku

**Í okkara dagliga arbeiði leggja vit m.a. stóran dent á:**
- At skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at tey ekkaleys kunnu fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum
- At vit seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar í einum kreativum umhvørvi
- At hava gott foreldra- og starvsfólkasamstarv

Útibarnagarðurin Fjallafípan er ein kommunalur stovnur, sum liggur í einum sera náttúruríkum avbjóðandi umhvørvi tætt við haga og fjøru.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 28. juni 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Útibarnagarðurin Fjallafípan**
v/ Jóhannu Vest
FO 700 Klaksvík


# BILSKROKK



***Lakering & Plátuverkstaður***
**v/Brynleif Askildsen**

**PLÁTUSMIÐUR**

**Søkt verður eftir plátusmiði at byrja beinanvegin.**

Umsøkjarin skal helst hava útbúgving innan plátusmíð, men kann ein við royndum innan økið eisini søkja.

Neyðugt er, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og harvið dugir sjálvur at loysa møguligar trupulleikar, sum vilja stinga seg upp í sambandi við arbeiðið.

Áhugað verða biðin um at ringja og avtala eina tí til eina samrøðu

Slættanesgøta 9 · Boks 2227
Tel 32 24 71 ella 21 24 71 · Fax 31 20 71
FO-110 Tórshavn


**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

## Fyribilsstarv sum leiðari

### á Húsarhaldsskúla Føroya

Í sambandi við at leiðarin fer í farloyvi, verður starvið sum leiðari á Húsarhaldsskúla Føroya lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2004 - 31. juli 2005.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 31.3 og 33.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv.

Víst verður annars til nærri lýsing av starvinum sær á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo

Umsóknirnar skulu stílast til Mentamálaráðið og sendast til

**Stýrið fyri Húsarhaldsskúla Føroya**
Stoksoyrarvegur 29
700 Klaksvík

í seinasta lagi 14. juni 2004.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Emmy Joensen, fulltrúa á Mentamálaráðnum.

**25. mai 2004**
**Mentamálaráðið · Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 · 110 Tórshavn**
Tlf. 355050 · Fax 355055 · e-postur: mmr@mmr.fo

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar, FO-188 Hoyvík
*Telefon 2298 312973 - Telefax + 298 318624*

## Reingerðarfólk

Av tí at eitt av føstu reingerðarfólkum okkara hesi seinastu 34 árini nú gevst vegna aldur, verður hervið søkt eftir einum reingerðarfólki at byrja 1. august 2004.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna, vanliga millum kl. 14.30 og 18.30.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til skúlan.

Umsóknir skulu verða rektaranum, Mads A. Winther, í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2004.

## Pedagogar/ hjálparfólk

Søkt verður eftir 4 pedagogum, at byrja 16. august 2004. Somuleiðis søkja vit eftir avloysara fyri hjálparfólk í farloyvi 21 t. v, í tíðarskeiðnum 1. september 2004 til 31. august 2005.

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár sum eru bólkaði soleiðis:

1 vøggustova á 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár. Til hesa stovu søkja vit eftir 2 pedagogum á 36 t.v., og 30 t.v.

3 barnagarðsstovur á 21 børn í aldrinum 3 til 5/6 ár. Til hesar stovur søkja vit eftir 1 pedagogi á 34 t.v. og 1 pedagogi á 30 t.v.

1 forskúlastovu á 21 børn í aldrinum 6 til 7 ár. Til hesa stovu søkja vit eftir 1 pedagogi á 30 t.v.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum
- Hevur ábyrgdarkenslu

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Ein stovn í menning, hvar tú fært møguleikan at seta tín dám á dagligdagin
- Ein vælvirkandi starvsfólkabólk
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi
- 94 praktfull børn

Vit vænta at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 9.

Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsóknir saman við avritum av prógvi og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2004.

Meira fæst at vita við, at venda sær til leiðaran Marjun Lassen á tlf. 455557 lokal 10.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
Fo – 700 Klaksvík


## Hondlesing í Tórshavn og Klaksvík

### frá 19. juni

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein øðrvísi máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð á

**tlf. +45 39664880 ella +45 60718683**